# askadd børn



*Sambært professaranum verða alt fleiri børn fødd, sum hava sera ilt við at læra. Talið av donskum børnum, sum hava tørv á umfatandi serundirvísing, er hækkað við 48 prosentum síðstu 10 árini.*

*Sambært Pál Weihe er tað longu staðfest, at føroysk børn hava tikið skaða av evnafrøðiligum evnum longu í móðurlívi.*

*– Ongin ivi er um, at fyri samlaðu fólkafjøldina í Føroyum, hevur tað týdning, at vit liva í og av einum dálkaðum umhvørvi, sigur Pál Weihe*

14 ár, sæst, at umleið helmingurin hevur somikið stórar trupulleikar við at nema sær lærdóm, at tey klára ikki fráfaringarroynd fólkaskúlans. Sostatt eru tey eisini skerd í mun til arbeiðsmarknaðin í framtíðini, sigur Peter Uldall. Eisini í Føroyum man talið av ov tíðliga føddum børnum verða hækkað síðstu árini, samstundis við menningina av tøkniligum og læknafrøðiligum førleikum.

## Og lítið súrevni

Innlæringartrupulleikarnir hjá teimum ov tíðliga føddu børnunum kunnu standast av, at heilin hevur fingið ov lítið súrevni ella er ávirkaður av øðrum stressfaktorum, tá barnið kom úr móðurlívi ov tíðliga.

Børn kunnu eisini fáa heilaskaðar vegna kropslig brek, so sum hjartasjúkur, sum gera, at heilin fær ikki nóg nógv súrevni. Eisini kunnu arvaeginleikar og arvaligar sjúkur hava við sær trupulleikar at læra.

Í hesum sambandi nevnir Peter Uldall, at børn hjá innflytarum eru oftari seinment, tí inngifta er vanligari í hesum umhvørvum. Eisini kann støðugt hækkandi aldurin á mammum ávirka talið á seinmentum børnum.

## Evnafrøðilig evni

Ein onnur, higartil ókend orsøk, eru evnafrøðiligu evnini frá ídnaðarframleiðslu, dálking og mati. Sambært Peter Uldall er ikki óhugsandi, at evnafrøðiligu evnini kunnu elva til brek í heilanum hjá fostrum, eins og at hesi evni eru undir illgruna fyri at elva til vanskeplan av kynsgøgnum hjá dreingjabørnum.

- So ikki er óhugsandi, at eitthvørt evnafrøðiligt ávirkar heilan negativt. Tað er longu prógvað, at tungmetal eru serstakliga vandamikil fyri menningina hjá ófødda barninum, sigur Peter Uldall.

Á hesum økinum eru vit sum kunnugt sera frammarlaga í Føroyum, har tað longu er staðfest, at føroysk børn hava tikið skaða av evnafrøðiligum evnum longu í móðurlívi.

- Hóast tølini eru smá, so er ongin ivi um, at fyri samlaðu fólkafjøldina í Føroyum, hevur tað týdning, at vit liva í og av einum dálkaðum umhvørvi, sigur Pál Weihe.

## Vantandi hagtøl

Við fyrilestrum sínum mælir dr. Uldall til meira umfatandi gransking av menningartarni hjá skúlabørnum.

- Vit skulu kanna hetta gjøllari við at kortleggja og savna inn hagtøl, so vit fáa eina heildarmynd av, hvussu umfatandi trupulleikin er, sigur hann.

- Eg sigi ikki, at hetta er ein risastórur samfelagstrupulleiki. Tað eru hóast alt bert umleið 1,4 prosent av nemingunum, sum hava tørv á umfatandi serundirvísing. Men eg sigi, at tað er ein trupulleiki fyri fólkaskúlan, tí hann skal rúma uppaftur fleiri børnum, sum hava ilt við at læra.

Pál Weihe tekur undir við danska professaranum, um at gransking er neyðug, skulu vit fyribyrgja skaðar á børn, í sambandi við føðing og barnsburð.

- Alt, sum kann stuðla menningini hjá óføddum og nýføddum børnum eigur at verða kannað. Tað verið seg evnafrøðilig, sosial, kropslig og sálarlig ávirkan, sum eisini hevur týdning fyri trivnaðin og tørvin á stuðli seinni í lívinum. Og ikki minst, møguleikarnar at koma undan sum best í modernaða samfelagnum, sigur hann.

## Stúrir fyri framtíðini

Peter Uldall stúrir fyri, hvussu børn við einum IQ langt undir miðal, sum er 90-110, skulu hóra undan í einari framtíð, har alt størri krøv verða sett til evnini at læra.

- Tey hava snøgt sagt ikki neyðugu intellektuellu førleikarnar, sigur hann, og leggur afturat:

- Vit eru í einari støðu í dag, har nógv teirra, sum eru arbeiðsleys, hava ilt við at røkja eitt starv, tí tey hava ikki neyðugu mentalu førleikarnar. Vit vita, at umleið eitt prosent av fólkinum eru menningartarnað. Tey kunnu ikki arbeiða. Harumframt hava umleið 10 prosent av næmingunum í skúlunum ilt við at læra, so ella so. Hesi hava tørv á ymiskum stuðulstiltøkum, so sum stuðulslærarum og serundirvísing. Og tað er ilt at siga, hvussu nógv teirra í roynd og veru kunnu røkja eitt starv, tá tey verða vaksin.

Professarin roknar tí við, at tørvur verður á alt fleiri vardum størvum, so tað eisini verða arbeiðspláss til tey seinmentu á framtíðar arbeiðsmarknaðinum.

Kelda
*Professor: Vit får flere retarderede børn. Grein eftir Jens Ejsing í Berlingske Tidende 8. mars 2008.*